

# So fór West Hercules

Deil:

**Jan Müller**

30.09.2014 - 09:05

Oljan.fo

Umleið klokkan 8.30 í morgun setti oljupallurin West Hercules kós móti oljuleiðunum við New Foundland. Loðsur var sjálvur havnameistarin í Runavík, Tórbjørn Jacobsen. Hann stóð eisini fyri hesi týðandi uppgávuni, tá pallurin kom á Skálafjørðin fyri skjótt hálvum øðrum mánað síðani.

Pallurin fór um Eystnes fyri løtu síðani við kós norður um Føroyar. Higani gongur leiðin tvørtur um hav til Kanada, har pallurin fer at bora fyri Statoil í hálvtannað ár.

Við pallinum til Kanada eru eisini fleiri føroyskir handverkarar hjá PAM Offshore Service, ið skulu arbeiða umborð, meðan siglt verður í góða viku ella so. Pallurin siglur við egnari megi, umleið 6 fjóðringar um tíman